Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 29.11.2023 kl. 18:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari:


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar:** | | | |
| 61/23 | 23/00027-1 | Sølutorg á matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið | 3 |
| 62/23 | 23/00239-1 | Kloakkskipan matr. nr. 37 undir Gøtueiði | 5 |
| 63/23 | 23/00434-2 | Umbøn um ummæli - Uppískoytisstykki til matr. nr. 220 í Leirvík (matr. nr. 195a LV) Búnaðarstovan | 7 |
| 64/23 | 23/00482-2 | 23/00482 - Umsókn um stuðul til ítrótt - Reysti 23/24 | 8 |
| 65/23 | 23/00483-3 | ABF18 | 9 |
| 66/23 | 23/00053-3 | Kappróðrarneyst í Norðragøtu | 11 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 67/23 | 23/00416-4 | Fíggjarætlan 2023 - 23/00416 | 13 |
| 68/23 | 23/00506-2 | Nýggjar viðtøkur fyri kommunufelagið | 15 |
| **Mál til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum:** | | | |
| 69/23 | 23/00496-5 | Íbúðarbygging - matr. nr. 199a í Syðrugøtu | 15 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar:**

## 61/23 Sølutorg á matr. nr. 169 á Havnalagnum í Leirvík við Lugarið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 18.01.2023 | 4/23 | 23/00027-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 23.01.2023 | 5/23 | 23/00027-1 |
| 3 Býráðið | 26.01.2023 | 7/23 | 23/00027-1 |
| 4 Vinnunevndin | 22.11.2023 | 15/23 | 23/00027-1 |
| 5 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2023 | 28/23 | 23/00027-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 27.11.2023 | 58/23 | 23/00027-1 |
| 7 Býráðið | 29.11.2023 | 61/23 | 23/00027-1 |

| Málslýsing: |
|---|
| Umsitingin hevur arbeitt við einum uppskoti til skipan av havnaøkinum í Leirvík við Lugarið, millum annað hevur kommunan havt ynski, um at gera eitt sølutorg, har bátar og onnur hava møguleika t.d. at selja fisk o.a.<br><br>Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru 500 t.kr avsettar til endamálið<br><br>**Ískoyti 22.11.02023**<br>Umsitingin hevur havt útbjóðing av sølutorginum við Lugarið í Leirvík, sí skjøl í málinum.<br><br>Verkætlanin kostar 756.726,- kr. avsettur peningur er 500.000,- kr.<br><br>Mælt verður til at játta 300.000,- kr. til verkætlanina, og at seta arbeiði í gongd. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| Umsitingin mælir til at bjóða arbeiði út sambart uppskotinum.<br><br>**Ískoyti 22.11.2023**<br>Mælt verður til, at fylgja tilmælinum hjá umsitingini. |

**Vinnunevndin 18. januar 2023**
Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 23. januar 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 26. januar 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Vinnunevndin 22. november 2023**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 27. november 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 62/23 Kloakkskipan matr. nr. 37 undir Gøtueiði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 17.05.2023 | 16/23 | 23/00239-1 |
| 2 Vinnunevndin | 16.05.2023 | 11/23 | 23/00239-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 22.05.2023 | 34/23 | 23/00239-1 |
| 4 Vinnunevndin | 22.11.2023 | 17/23 | 23/00239-1 |
| 5 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2023 | 29/23 | 23/00239-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 27.11.2023 | 59/23 | 23/00239-1 |
| 7 Býráðið | 29.11.2023 | 62/23 | 23/00239-1 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini fyri 2023 hjá Eysturkommunu er avsett 500.000,- kr. til íløgur til kloakkskipa til havnarlagi undir Gøtueiði. Harumframt hevur umsitingin fingið upplýst frá Kongshavnar Havn at Eysturkommuna eigur 400.000,- kr. sum kann brúkast til hesa verkætlan.

Ætlanin er at gera kloakkskipanina í samband við samtyktu ætlan fyri havnarlagi undir Gøtueiði. Sí viðfesta skjal.

Harumframt skal drekki vatn og regnvatnskipan gerast. Sí kostnaðarmeting hjá PB Consult.

Umsitingin mælir til at brúka játtanina, sum er avsett er á FÆ 2023 til at fáa gjørt kloakkskipanina í havnarlagnum undir Gøtueiði, og brúka pengarnar sum Eysturkommuna eigur hjá Kongshavnar Havn til hesa verkætlan, og at seta hetta arbeiði í gongd. Umframt at finna í restandi pengin so drekkivatn og regnsvatnsskipan eisini kann gerast.

**Ískoyti 22.11.2023**

Umsitingin hevur bjóða kloakk- leiðingsarbeiði út sum innboðin licitatión til 5 arbeiðstakarar, 2 boð komu innaftur, sí skjøl í málinum.

Verkætlanin kemur at kostað 1.560.000,- kr. við avsettu játtan og pengunum frá Kongshavnar Havn, skal játtast 660.000,- kr. afturat til verkætlanina.

Mælt verður til at játta hesar pengarnar og seta arbeiði í gongd.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Ískoyti 22.11.2023**
Mælt verður til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Vinnunevndin 16. maj 2023**
Vinnunevndin mælir til at projektera og gera útboð. Tá ið tilboðini eru innkomin verður hetta lagt í nevnd aftur til støðutakan.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 17. maj 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini.

**Fíggjarnevnd 22. mai 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og byggi og býarskipanarnevndini.

**Vinnunevndin 22. november 2023**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 27. november 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 63/23 Umbøn um ummæli - Uppískoytisstykki til matr. nr. 220 í Leirvík (matr. nr. 195a LV) Búnaðarstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2023 | 30/23 | 23/00434-2 |
| 2 Býráðið | 29.11.2023 | 63/23 | 23/00434-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 27.11.2023 | 61/23 | 23/00434-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost frá Umhvørvisstovuni, har heitt verður á kommununa um at gera eitt ummæli til marknaðarumskipan av matr. nr. 220 og 195a í Leirvík.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at samtykkja ummæli til Umhvørvisstovuna. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndini tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 27. november 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 64/23 23/00482 - Umsókn um stuðul til ítrótt - Reysti 23/24

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 21.11.2023 | 68/23 | 23/00482-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 27.11.2023 | 62/23 | 23/00482-2 |
| 3 Býráðið | 29.11.2023 | 64/23 | 23/00482-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Svimjifelagið Reysti søkir um stuðul til teirra virksemi í sesongini 23/24. Rakstur felagsins verður í ár hægri enn undanfarin ár av tí, at venjarar í ár fáa samsýning fyri at venja børnini. Herafturat er eitt mál hjá felagnum, at luttaka í enn fleiri kappingum í ár og hetta hevur ymiskar eykaútreiðslur við sær, t.d. til mat og ferðing.<br><br>Søkt verður um 100.000 kr.<br>Bæði í 2019, 2020 (des. 19) og í 2021 hevur mentanarvendin stuðlað felagið við somu upphædd. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á rakstrarkonto 524, ”Stuðul til ítrótt”, eru 850.000 kr settar av fyri fíggjarárið 2023. Av hesum eru per d.d. 95.000 kr. eftir. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita 95.000 kr. í stuðul. Hetta er upphæddin, ið er eftir á konto 524 |

**Mentanarnevndin 21. november 2023**
Mælt verður til at samtykkja

**Fíggjarnevnd 27. november 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

## 65/23 ABF18

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | | | 23/00483-3 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 23/00483-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 27.11.2023 | 63/23 | 23/00483-3 |
| 4 Býráðið | 29.11.2023 | 65/23 | 23/00483-3 |

**Málslýsing:**

**Upprunin til málið**
Eysturkommuna er limur í Byggiharrasamtaki Føroya. Samtakið er eitt áhugafelag, har byggiharrar, ið hava eina virkna og professionella tilgongd til vinnuna, samstarva um felags áhugamál og skipan mótvegis veitarum í byggi- og annleggsvinnuni. Landsverk hevur formansskapin í samtakinum. Hinir limirnir eru í løtuni: SEV, Bústaðir, P/F Eystur- og Sandoyartunnil, Klaksvíkar-, Eystur-, Runavíkar,- og Fuglafjarðar kommuna.

Í notati frá limafundi hin 18.10.2023 heitir formaðurin á hinar limirnar um undirtøku til at seta í verk dagførdar reglur, sokallaðar "ABF reglur", í Føroyum.

**Lýsing av málinum**
Í nøkur ár hevur ein arbeiðsbólkur umboðandi Byggiharrasamtakið, Føroya Handverksmeistarafelag og Ráðgevarafelagið, samráðst um eitt dagført samskipað avtalusett, ið skal skipa bygging í Føroyum.

Hóast full semja ikki er um allar lutir í avtalusettinum, mælir nevndin í Byggiharrasamtakinum til, at limirnir byrja at brúka avtalusettið í framtíðar verkætlanum. Avtalusettið fer at fevna um ABF, ABRF, ABTF, ABF forenklet, ABRF forenklet, ABTF forenklet, við tilhoyrandi fylgiskjølum.

Sí fylgiskjøl

**Lógir, ásetingar o.a.** Galdandi ABF06

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniski leiðarin hevur luttikið í arbeiðsbólkinum í samtakinum, saman við øðrum.

**Skjøl**

1. Undirtøka fyri íverksetan
2. Almindelige betingelser for arbejder og leverancer i bygge- og anlægs-virksomhed (ABF 18)

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| |
|---|
| **Tilmæli**<br>Tekniski leiðarin, mælir til at heimila teknisku fyrisitingina at brúka nýggju ABF reglurnar, sambært áheitanini frá Byggiharrasamtaki Føroya. |
| |

**Fíggjarnevnd 27. november 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í nevnd til viðgerðar.

## 66/23 Kappróðrarneyst í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 21.03.2023 | 12/23 | 23/00053-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.03.2023 | 18/23 | 23/00053-3 |
| 3 Býráðið | 30.03.2023 | 20/23 | 23/00053-3 |
| 4 Vinnunevndin | 22.11.2023 | 16/23 | 23/00053-3 |
| 5 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 23/00053-3 |
| 6 Fíggjarnevnd | | | 23/00053-3 |
| 7 Býráðið | 29.11.2023 | 66/23 | 23/00053-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Sí hjálagdu tekningar (Byggiprogram 25.01.2023)<br><br>**Ískoyti 22.11.2023**<br>Ynski er komi um nýggja staðseting av kappróðraneystinum, sí skjal í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kr. 2.000.000,- eru settar av til endamálið. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka støðu til, um arbeiðið skal setast í gongd.<br><br>**Ískoyti 22.11.2023**<br>Mælt verður til at taka undir við nýggju staðsetingini av kappróðraneystinum. |

**Mentanarnevndin 21. mars 2023**
Mentanarnevndin mælir til at verkætlanin verður gjørd klár til útboð (tekningar, kostaðarmeting o.a.). Nevndin ynskir sær eisini eina neyvari gjøgnumgongd av tekningum og øðrum.

**Fíggjarnevnd 28. mars 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**<u>Býráðið 30. mars 2023</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinuum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**<u>Vinnunevndin 22. november 2023</u>**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini

**<u>Býráðið 29. november 2023</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

# 67/23 Fíggjarætlan 2024 - 23/00416

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.09.2023 | 55/23 | 23/00416-4 |
| 2 Býráðið | 26.10.2023 | 60/23 | 23/00416-4 |
| 3 Fíggjarnevnd | 23.10.2023 | 57/23 | 23/00416-4 |
| 4 Fíggjarnevnd | 27.11.2023 | 60/23 | 23/00416-4 |
| 5 Fíggjarnevnd | 29.11.2023 | 64/23 | 23/00416-4 |
| 6 Býráðið | 29.11.2023 | 67/23 | 23/00416-4 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi uppskot til 1. viðgerð til fíggjarætlan fyri 2024.

Sambært uppskotinum so verða samlaður inntøkurnar frá 141 mió. og rakstrarútreiðslurnar verða 113 mió.. Íløgurnar verða 58,5 mió.

Skattaprosenti verður lækkað frá 20,5 til 19,9 og barnafrádrátturin hækkar úr 8.500,00 til 9.000,00 kr.

**Ískoyti 28. november 2023.**
Endaligt uppskot hjá fíggjarnevndini til fíggjarætlan 2024, verður klárt til býráðsfundin.

**Ískoyti 29. november 2023.**
Sambært fyriliggjandi uppskoti (dagf. 29/11-23) frá fíggjarnevndini eru høvuðstølini hesi:

| | |
|---|---|
| **Inntøkur íalt** | **140,6 mió** |
| Rakstrarútreiðslur | 115,2 mió |
| Rentuútreiðslur | 2,5 mió |
| Útr. til rentustuðul | 1,8 mió |
| **Úrslit áðrenn avdráttir** | **21,1 mió** |
| Íløgur | 59,0 mió |
| **RLÚ** | **-37,9 mió** |
| Avdráttir | 8,3 mió |

Skattaprosentið verður 19,9 og barnafrádrátturin verður 9.000,00 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

**Fíggjarnevnd 25. september 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan verður lagt til føstu nevndirnar til víðari viðgerð.

**Fíggjarnevnd 23. oktober 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan.

**Býráðið 26. oktober 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevnd 27. november 2023**
Málið útsett til nýggjan fund 29. november kl .15.00

**Fíggjarnevnd 29. november 2023**
Mælt verður til at samtykkja fyriliggjandi uppskot (dagf. 29/11-23) til fíggjarætlan fyri 2024

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti (dagf. 29/11-23) til fíggjarætlan fyri 2024.

## 68/23 Nýggjar viðtøkur fyri kommunufelagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.11.2023 | 68/23 | 23/00506-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Broytingar í viðtøkunum hjá kommunufelagnum. Sí fylgiskjøl. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at góðtaka broytingar í viðtøkunum. |

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við broytingunum í viðtøkunum.

**Mál til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum:**

## 69/23 Íbúðarbygging - matr. nr. 199a í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.11.2023 | 69/23 | 23/00496-5 |
| 1 Fíggjarnevnd | 29.11.2023 | 65/23 | 23/00496-5 |

**Fíggjarnevnd 29. november 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. november 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

fundurin lokin kl. 20.30

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen